

## Kunnu Føroyar gerast limur í ES, EFTA ella EBS

– á hvønn hátt og hvat krevst? Professari í altjóðarætti og ríkisrætti, Ole Spierman, leggur fram løgfrøðiligt upprit um Føroya rættarligu støðu mótvegis ES, EFTA og EBS og ger sínar metingar um, hvørjir møguleikar eru og hvat krevst, skulu Føroyar søkja um limaskap í einum av hesum skipanum í Miðlahúsinum í Vágsbotni mikukvøldið 18. februar kl. 19.00. Norðuratlantsbólkurin sigur í tíðindaskrivi, at »Onkur tosar í eystur um ES limaskap og tey sonevndu "fýra frælsini". Ein annar svarar í vestur um EFTA-limaskap. Ein triði tosar um eina EBS-skipan, sum Noreg, Ísland og Liechtenstein hava við ES, har tey eru partur av teimum fýra frælsunum, uttan at verða limir í ES.« Boðini eru mong, men ber tað til hjá Føroyum at velja millum hesar møguleikar í núverandi ríkisrættarligu støðu? Hvat krevst, um føroyingar skulu royna aðra ella hina leiðina? Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi hevur sett sær fyri at lýsa og greina nakrar av teimum mongu og fløktu spurningunum, ið hava týdning fyri altjóða samstarv Føroya mótvegis evropeisku skipanunum. Norðuratlantsbólkurin hevur biðið um eitt upprit um hesar spurningar frá danska professaranum í atjóðarætti og ríkisrætti, Ole Spierman, sum er handað bólkinum. Á kjakfundi í Miðlahúsinum fer Ole Spierman at leggja fram sínar metingar og niðurstøður og at svara spurningum. Jógvan Mørkøre og Sonja Jógvansdóttir, samfelagsfrøðingar, ið bæði hava skrivað ritgerðir um og granskað í evropeisku skipanunum, fara at leggja fyri við viðmerkingum og útgreinandi spurningum, sigur Norðuratlantsbólkurin.

# Tryggjaðu ikki brandmúrar nóg væl

**Ein menniskjansligur feilur var orsøkin til, at uppstillaðu brandmúrarnir til samanbygdu húsini á Heiðum koppaðu fyrr í vetur**

STORMSKAÐI

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tíðliga í vetur hendi umfatandi stormskaði í Hoyvíkshaganum, tá fleiri av brandveggunum, ið arbeiðsfólk hjá byggifyritøkuni J&K Petersen høvdu sett upp, koppaðu. Tað var eitt kvøldið, tá sera nógvur vindur var, at veirarnir, ið skuldu tryggja veggirnar, meðan einki var komið upp at standa millum veggirnar, ikki vóru nóg væl tryggjaðir.

Steinálvur Petersen, stjóri í J&K Petersen, sigur, at tað var ein menniskjansligur feilur, ið gjørdi at hetta óhappið hendi.

- Veggirnir vóru ikki nóg væl tryggjaðir, onkur feilur var gjørdur, og tí hildu teir ikki í nógva vindinum, sigur Steinálvur Petersen.

### Tryggingin tekur við

Óhappið hevur darvað arbeiðinum við at seta samanbygdu sethúsin upp á Heiðum í Hoyvíkshaganum. Enn standa fleiri av grundunum tómar, við bara brandmúrunum uppstillaðum.

Í viðmerking til óhappið við brandmúrunum sigur Steinálvur Petersen, at tryggingin tekur við har, og at annars koyrur alt eftir teimum vanligu mannagongdum.

Tískil kemur hesin menniskjansligi feilurin ikki at kosta fyritøkuni tað heilt stóra, tá saman um kemur.

Eingin mansskaði hendi, tá veggirnir koppaðu, og sum skilst, so eru teir koppaðir meðan einki fólk var til arbeiðis nærhendis.



# Tilmælið um solarium við í heildarætlan

**Tilmælið frá Pál Weihe, yvirlækna, og Høgna Debes Joensen, landslækna, um at seta aldursrmark á fyri nýtslu av solarium verður tikið við í heildarætlanina fyri krabbamein, ið verður klár í summar.**

KRABBAMEINS-VIÐGERÐ

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í gjár skrivaði Sosialurin, at arbeiðið við at gera eina fullfíggjaða heildarætlan fyri alla krabbameinsviðgerð verður liðugt í summar. Hans Pauli Strøm hevur nú eisini heitt á arbeiðsbólkin um at taka hetta spesifikka økið um solariumsnýtslu og móðirmerkjakrabba við í heildarætlanina.

Úrslitið av arbeiðinum við at gera eina fullfíggjaða heildarætlan fyri krabbameinsviðgerð verður klárt at handa landsstýrismanninum í heilsumálum, Hans Paula Strøm, í summar.

Tó segði Hans Pauli Strøm við Sosialin í gjár, at hann væntar at tað verður neyvan ráð at seta nakað munagott av hesi heildarætlan í verk í næstum.

- Landskassans inntøkur fara neyvan at vaksa næsta ár, og sostat geri eg mær ikki stórar vónir um at vit sleppa at økja útreiðslurnar, segði Hans Pauli Strøm við Sosialin í gjár.

### Vaksandi trupulleiki

Í árunum millum 1996 og 2006 eru átta føroyingar deyðir av móðirmerkjakrabba. Samstundis eru staðfestu tilburðirnir av móðirmerkjakrabba støðugt vaksandi hjá bæði monnum og kvinnum, og frá 2003 til 2005 meir enn trýfaldaðist talið av tilburðum av potentielt deyðiligu sjúkuni úr 4 upp í 15 tilburðir.

Í Sosialinum í gjár stóð skrivað úr tilmælinum, at »Greitt samband er millum sannlíki fyri at fáa móðirmerkjakrabba og hvussu nógv húðin hevur verið útsett fyri ultraviolettum ljósi.« Tí siga landslæknin og Pál Weihe, at vit eiga at minka um útsetilsi fyri ultraviolett ljós, og at her er solarium ein ógvuliga ítøkilig kelda, og frá einum heilsusjónarmiði mugu solarium tí sigast at skaða fólkaheilsuna.

Niðurstøðan í tilmælinum er greið. Ung undir 18 ár eiga ikki at sleppa at keypa sær til ljósviðgerð í Føroyum.

Hetta tilmælið verður nú tikið við í heildaætlanina fyri krabbameinsviðgerð, sum tó neyvan ráð verður at seta í gildi í bræði.



*Tilmælið um at seta aldursmark á nýtslu av solarium verður tikið við í heildarætlanina fyri krabbameinsviðgerðir og fyribyrging av krabba – sum tað tó neyvan verðu ráð til at seta í verk*